

# Spæliloyvið hjá Hans Fróða liggur enn á Toftum

**Herfyri spældu báðir føroyingarnir í íslendska felagnum Fram, Hans Fróði Hansen og Fróði Benjaminsen, ein dyst í Reykjavíkkappingini fyri felag sítt, og teir vunnu dystin 5-3, men av tí at spæliloyvið hjá Hans Fróða ikki er komið í rættlag, tapti Fram dystin á skrivaraborðinum**

FÓTBÓLTUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú er longu nakað av tíð farin, síðani teir báðir Hans Fróði Hansen og Fróði Benjaminsen stungu í klæðssekkin og fóru yvir til Íslands, har teir skulu spæla við íslendska felagnum Fram. Venjari hjá felagnum er hin í Føroyum so navnframi rumenin, Ion Geolgau, ið áður hevur vant bæði HB og B36.

## Hendingarrík debut

Tað gjørdist ein minnisríkur dagur, bæði fyri tað og tað ringa, tá ið teir báðir fyrrverandi B68arnir leiktu sín fyrsta dyst fyri Fram. Hetta hendi tann 8. februar, tá ið Fram leikti ímóti Thrótti í sonevndu Reykjavíkskappingini. Tað gjørdist ein ógvuliga málríkur dystur, sum Fram vann 5-3, millum annað takkað verið einum máli frá Fróða Benjaminsen. Seinni í sama dysti fingu báðir føroyingarnir tó reyða kortið, og til endans hevði Fram bert átta mans á vøllinum, men fingu tó hildið tørn.

Stutt eftir dystin kom tað tó fram, at alt ikki ruggaði rætt við spæliloyvinum hjá Hans Fróða, og tískil tapti Fram dystin á skrivaraborðinum, við tað at Hans Fróði ikki hevði loyvi at spæla.

Formaðurin í B68, Niclas Davidsen, sigur, at tað er langt síðani, at B68 og Fram gjørdu semju viðvíkjandi søluni av Hans Fróða. Tá bleiv eisini semja gjørd um, at B68 lat Fram spæliloyvið hjá leirvíkinginum, so skjótt toftamenn høvdu fingið bankatrygd frá íslendskum peningastovni viðvíkjandi rindan av samsýning til B68.

Enn hevur B68 tó ikki sæð nakað til hesa bankatrygd, hóast einar tvær vikur eru farnar, og Niclas Davidsen sigur, at so leingi hetta ikki er komið í rættlag, verður spæliloyvið hjá Hans Fróða ikki sent til Íslands.


## Skrivstovufólk til skuldarabókhald

Til eitt virki í Tórshavn verður søkt eftir einum fólki til skuldarabókhaldið. Arbeiðið snýr seg fyrst og fremst um at røkja sambandið við skuldararnar, at gera gjaldsavtalur við teir og hava eftirlit við, at tær verða hildnar.

Talan er ikki um fulltíðarstarv, og tann, sum settur verður í starvið, kann sjálvur vera við til at leggja arbeiðstíðina til rættis.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast so skjótt sum til ber. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2004.

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
PRICEWATERHOUSECOOPERS
An associated firm of
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

Sosialurin 341800

i
Sosialurin

Lýsið
við
brúktum
bilum
Sosialurin
www.sosialurin.fo

- 25.000,- kr



Fiat Scudo 2,0 JTD van ....... kr. 194.600,-
Avsláttur við ongum brúktum bili í býti kr. - 25.000,-
Einans kr. 169.600,-
Bilfríðkan FIAT
við Velbastaðvegin - tlf 317300 - Postboks 1034 - 110 Torshavn



Hestprent
gevur
pappírinum
betri flog
HESTPRENT

Toyota - dele
brugte og nye
Vi sender hver dag til Færøerne
Aabenraa Autogenbrug
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto · salg@dkauto.dk

Sosialurin 341800





## Bingjupláss í Vági

Frá og við mánadegi 23. februar 2004 eru upplatingartíðirnar á bingjuplássinum í Vági hesar.

| Dagur | Upplatingartíðir |
|---|---|
| Mánadag | Frá kl. 14.00-18.00 |
| Týsdag | Stongt |
| Mikudag | Frá kl. 14.00-18.00 |
| Hósdag | Frá kl. 14.00-18.00 |
| Fríggjadag | Frá kl. 14.00-20.00 |
| Leygardag | Frá kl. 14.00-19.00 |

Í nevndu tíðarskeiðum er eftirlitsfólk á bingjuplássinum og skipar fyri, hvar ruskið skal beinast.

**Vágs Býráð**
**Teniska nevnd**

## Skrivstovulærlingur

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi til byggivirki í Havn at byrja, skjótast tilber.

Áhugað kunnu senda umsókn saman við møguligum viðmælum/prógvum til:

**P/F Articon**
Postboks 3109
110 Tórshavn
tlf. 350 700

ARTICON

## Rørarbeiði

Vit átaka okkum at gera
- Hitaverksarbeiði
- Ventilatiónsarbeiði
- Sanitetsarbeiði

í høvuðsstaðarøkinum.

Tilboð verða eisini givin.

**Ring tlf. 225701· 317901 · 210168**

Veðrið Sosialurin Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk

## Bilar til sølu

SsangYong Rexton RX290 4WD 7 setur



prísur 330.000,-

· Árgang 2003 · km 22.500 · Aut. gear · 2,9 Turbo diesel intercooler · Automatiska í- og úrkoblan av 4WD · Centrallás · Fjarstýrdan lykil · Tónaðar rútar · Krók · Lættmetalfelgur við dekkum · Pioneer anlegg við fløguspælara · Vælhildin

Sosialurin 341800

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

## Til sølu



BMW 320i. Í góðum standi. Árg. 89, 175.000 km.

Lagalig fígging

FIAT
Bilfríðkan
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300

## Frá Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag

Aðalfundurin, sum lýstur er við uppslagi á Arbeiðsmannafelagshúsinum verður hósdagin 4. mars kl. 20.00 á Restaurant Muntra.

Fundarskrá eftir lógini.

**Nevndin fyri Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag**

## Partabræv til sølu

1 partabræv í Sp/f Niels Paula til sølu fyri hægsta boð.

**Tlf. 777 211**

## Eg eri vilst í Klaksvík



Eg eri ein 9 mánaðar gomul ketta, sum bleiv burtur í Torvgøtu í Klaksvík sunnukvøldið. Eg eiti Rósa, havi onki hálsband og eri ikki merkt. Eg eri krunkasvørt og hvít um hálsin, búkin, labbarnar og bakbeinini. Um nakar finnur meg, kunnu tit so vinarliga hjálpa mær heim aftur til mammu mína og familjuna hjá mær. Tað kunnu tit gera við at ringja

**219870 ella 457113**

## Til sølu



Nissan Primera 1,6. Sera væl hildin, sum nýggjur. Árg. 6/99, 60.000 km.

Lagalig fíging

FIAT
Bilfríðkan
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300

## Ársaðalfundur RSF

Róðrarsamband Føroya hevur ársaðalfund í ÍSF-húsinum leygardagin 27. mars kl. 10.00. Fundarskrá sambært grein 4 í lógunum fyri RSF.

Uppskot um lóg og lógarbroyting skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi fjúrtan dagar fyri fundin.

RSF 1960